DAGSINS MEINING

Vinnudagurin

Vinnudagurin er eitt frálíkt tiltak, har herðaklapp verða latin vinnu og einstaklingum, og er hetta gott. Í ár fekk ein tónleikaúrmælingur, Teitur Lassen, herðaklappið fyri ársins átak, og Vónin, ein fyrimynd í føroyskari vinnu, fekk heiðurin av at gerast ársins virki. Vit ynskja Teiti Lassen go Vónini tillukku við avrikunum. Vinnudagurin er vónandi komin fyri at vera, men einki er so gott, at tað ikki kann gerast betur.

Tað kann altíð diskuterast, hvussu heppið tað er at leggja Vinnudagin, sama vikuskiftið, sum 10 ára dagin fyri Sjóvinnubankakrakkið 6. oktobur 1992. Hepnari blívir tað ikki, tá man so hoyrir eitt orðaval, ið til forveksling ljóðar sum ein ársfrágreiðing úr gamla Sjóvinnubankanum.

Studningur verður altíð útróptur til at verða av tí illa av Vinnuhúsinum, og tað er hann eisini í mongum førum. Hví letur Vinnuhúsið so sær lynda, at man hevur ein stuðul uppá 8% til skipasmíð í Føroyum. Er hetta ikki dupultmoralur av ringasta slag, tá man letst verða ímóti studningi, men so framvegis tekur ímóti? Onkur sigur, at um ikki studningur verður latin til skipasmíð í Føroyum, so endar alt skipasmíð aðrastaðni, eitt nú í Asia. Er tað ikki soleiðis fríi marknaðurin riggar? Um koreanarar duga best at byggja skip og gera tað bíligast, so má tað verða har, man byggir skip sambært liberalistunum, og hetta er júst tað, sum Vinnuhúsið letst standa fyri. Hetta ger Vinnuhúsið, meðan man í allari stillheit tekur undir við stuðuli til skipasmíð, flutningsstuðuli og øðrum. Hetta er ikki rætt. Tað vildi verið eitt risaframstig, um man fekk Vinnuhúsið at viðganga, at tað ikki er líka mikið, um skip verða bygd í Korea ella í Føroyum. Eisini hevði verið snilt, um Vinnuhúsið á næsta vinnudegi legði fram øll slag av studningi, ið verður latin til limirnar í Vinnuhúsinum, tí sum støðan er í dag, eru nógv, ið halda, at føroyska vinnan er studningsfrí. Hetta er eitt ideal, ið ivaleyst hevði verið frálíkt, men soleiðis er støðan nú einaferð ikki, hví so ikki viðganga tað alment – eitt nú á vinnudegnum ella í frálíka prentlutinum "Vinnusjónarmið".

At prenta Vinnusjónarmið hvørt ár er eisini eitt frálíkt tiltak, men vónandi er endamálið við hesum prentluti, at elva til kjak, heldur enn at diktera nakað. Tað sker í eygað á nógvum, at Vinnuhúsið hevur so stórt álit á umsitingini í Tinganesi, at man vil geva henni monopol at tilmæla nevndarlimir. Vandin fyri organisatoriskum innavli er stórur, og missir landstýrismaðurin so at siga alt vald. Vinnuhúsið kundi heldur rátt limum sínum til at valt politikarar, ið teir hava álit á og flokkar, ið ikki seta landstýrimenn, ið ikki duga at hava vald. Tað vildi verið ein vanlukka, um umsitingin slapp at fáa einkarætt at tilnevna nevndarlimir, bert tí at summi í hesum samfelagnum valdu Miðflokkin og Fólkaflokkin til seinasta og næstseinasta val.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Ein skammarblettur

– Tað verður sagt, at vald korrumperar. At Tjóðveldisflokkurin skuldi lata seg so dyggiliga korrumpera aftan á bert einari setu í Tinganesi er at undrast á. Tað ber ikki boð um sterkan rygg, og skammarbletturin verður ringur at tváa av aftur, skrivar A. Guttormur Djurhuus í hvassari viðmerking til Tjóðveldisflokkin

A. Guttormur Djurhuus

Tá ið samráðingarnar til skipan av landsstýrissamgongu vóru aftan á valið, gjørdu Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin avtalu um ikki at fara í samgongu, uttan so at hin flokkurin eisini slapp upp í part. Mín postulering er, at Tjóðveldisflokkurin og Miðflokkurin hava gjørt ein líknandi handil. Bert við tí muni at hann varð gjørdur í loyndum. Annars verður ringt at skilja tað, sum fyrifirst.

Hvussu er og ikki, so skerst ikki burtur, at Tjóðveldisflokkurin hevur ábyrgdina av, at ein átrúnaðarligur, fundamentalistiskur flokkur í dag situr á ovastu rók í føroyskum politikki. Og helst er tað so, at Høgni Hoydal, við síniu sterku støðu í flokkinum, sjálvur hevur ábyrgdina av, at so er.

Tað hevur verið sagt av tjóðveldismonnum, at valið var millum pest og kolera. Valið var í veruleikanum ikki millum pest og kolera, men millum pest og beinkrím. Og tá er valið lætt. Bæði Javnaðarflokkurin og Sambansflokkurin eru, hóast sambandskir, liberalir flokkar. Eisini har eru minni dámligir einstaklingar, men teir eru allastaðni at finna. Eisini í Tjóðveldisflokkinum. Hvørki tað at fara í samgongu við Javnaðarflokkin ella Sambandsflokkin hevði verið at mett sum verri enn beinkrím. Og at fara í andstøðu var eisini ein møguleiki!

Ikki kenni eg nakað dømi, har tú er sloppin snikkaleysur burtur úr eini alliansu við sjálvan Mefistofeles. Tjóðveldisflokkurin vildi verði eindømi, um hann ger tað.

Hvør er so tann flokkur, sum Tjóðveldisflokkurin hevur sett á ovastu rók í føroyskum politikki?

Enn hevur hann kanska ikki gjørt so ógvuliga nógv um seg, men tó nóg mikið til, at sigast kann, at hann roynir at inna í verki tað, hann hevur sagt í orðum. Hann vil lata føroyingar í eina andaliga spennitroyggju, um hann sleppur tað.

Í etiska ráðnum, sum skal meta um, hvat, ið rangt og rætt er, hevur hann skift meirilutan av nevndini út og sett í staðin sínu egnu, trongskygdu viðhaldsfólk. Hetta slapp flokkurin at gera, uttan at nakar kleiv í tvey. Jú, Annita á Fríðriksmørk einsamøll í tinginum. Og uttan fyri tinggátt Eyðun Andeassen, uttan at hugsa um, at tað kanska kann kosta. Bæði tvey hava stóran heiður uppibornan.

Sami flokkur ætlar fyrsta dagin at seta á stovn inkvisitiónsrætt av fundamentalistiskum prestum, vit hava fingið nóg nógvar av teimum nú til at manna ein rætt, at døma um kvinna, sum ynskir tað, skal fáa fostrið tikið ella ikki. Kvinna, sum er komin illa fyri, verður kallað inn, forhoyr verður hildið, og síðani verður dømt. Tann hjálp og stuðul eini slíkari kvinnu tørvar, verður ikki veittur av andaligum neyðardýrum. At kvinna í slíkari støðu ofta hevur hjálp fyri neyðini, er einki at ivast í og átti tí eitt ráð samansett av sosialráðgeva, psykologi og lækna at verið sett á stovn. Limirnir í ráðnum skuldu verið átrúnaðarliga indifferentir. Tá kundi ráðið ráðgivið kvinnuni og stuðlað henni í hennara avgerð, um hon so var kristin, av aðrari trúgv ella vantrúgvandi. Og samrøðan skal sjálvandi bert vera, um kvinnan sjálv ynskir tað.

Um hon, sum komin er illa fyri, kennir trongd til at tosa við ein prest ella misjónsmann, ger hon vælsagtans tað. Ikki hugsi eg, at nakar »sálarhirði« ber seg undan eini slíkari samrøðu við eitt av sínum fárum.

Fosturtøkan skal niður á null. Eisini har tað stendur um lív skal fosturtøka verða bannað. Gud skal einsamallur ráða fyri, hvør við skal liva ella doyggja. Og hesin flokkur situr við hægstu leiðslu av okkara heilsuverki! Eisini her var tað Annita á Fríðriksmørk, sum einsamøll gjørdi vart við seg. Hvar eru flokksfelagarnir? Og kvinnufylkingarnar?

Frægari man vera at liva í ríkisfelagsskapi við andsfrælsi enn í fullveldisstati undir átrúnaðarligari kúgan.

Tað størsta frælsi, sum er, er andsfrælsi. At hugsa rætt er stórt, men at hugsa frælst er størri.

Tá eg vaks upp kundi verða sagt um onkran, altíð var tað um onkran, sum skaraði framúr, at hann var fríteinkjari. Tað varð sagt við virðing og eitt sindur av bangilsi. Og tað av røttum. At hugsa rætt vilja vit øll, men at hugsa frítt tora tey fægstu av okkum.

Tað verður sagt, at vald korrumperar. At Tjóðveldisflokkurin skuldi lata seg so dyggiliga korrumpera aftan á bert einari setu í Tinganesi er at undrast á. Tað ber ikki boð um sterkan rygg, og skammarbletturin verður ringur at tváa av aftur.

Næraberg og Háfoss

Ólavur í Beiti
rithøvundur

Sá nú í bløðunum, at løgtingsmaðurin Kristina Háfoss er farin at skuldseta fiskimálarádharran fyri bæði eitt og annað og setir fiskimálarádharranum nakrar juridiskar spurningar eisini og roynir við hesum at skaða hansara trúvirði.

Fari í hesum sambandi at ráða løgtingsmanninum, Kristinu Háfoss, til heldur at spyrja hjúnarfelagan, sum dagliga starvast sum juridiskur ráðgevi hjá fiskimálarádharranum, um hetta mál!

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Rullandi redaktionin:
tel. 220507

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Løgtingslógir og synd

Hans Andrias M. Joensen

Áhugaverda kjakið, sum verið hevur í bløðum og útvarpi seinastu tíðina, hevur snúð seg um mong ymisk evni: Um Løgtingið skal samtykkja eina lóg um skrásett parlag fyri samkynd, um lóggávuvaldið skal verða stýrt av einum ódefineraðum trúarvaldi, um samkynd hava skuldina av AIDS, um barnakonur høvdu skuldina fyri nátasjúkuni á sinni, um danska grundlógin er galdandi fyri Føroyar og mangt annað.

Eg fari at royna at geva mítt íkast til tað, sum snýr seg um at seta eina løgtinglóg í gildi um at lógarfesta rættin hjá tveimum samkyndum at verða skrásettir/ar sum par, so at samogn, arvarættur og annað líknandi kemur í betri legu, enn tað er í dag. – Lógaruppskot um hetta verður neyvan lagt fyri Løgtingið fyrrenn samráðingarnar eru lidnar um at sivilrættarlógarmál verða yvirtikin frá Fólkatinginum til Føroya Løgting. So tað er gott, at almenna orðaskifti kemur longu nú.

Argumentini ímóti

Høvuðsargumentið, eftir hvat eg havi sæð, ímóti slíkari lóg um skrásett parlag, hevur verið, at tað sigst at vera synd ífylgi Bibliuni, at tvær kvinnur ella tveir menn liggja saman í song.

Hugtakið »synd« kann lýsast við orðunum : »alt tað sum er skeivt at gera«.

Vit, sum rokna okkum at vera kristin, eru samd um, at Tey tíggju boðini eiga vit at halda. Eisini eru vit, sum eru limir í Fólkakirkjuni, samd um Trúarjáttanina. Næstakærleiksboðið, eru øll kristin eisini samd um, men ymiskt er, hvussu fólk meina, at tað skal praktiserast.

Tá tað kemur til Móselógina og allar tær nógvu reglur, sum har standa, so eru jú, ymsu trúarbólkarnir ikki heilt samdir: Skulu vit halda okkum frá at eta blóðpylsu? Skulu vit halda okkum frá at eta svínakjøt? Er tað synd at ganga nakin í hitarúminum í svimjihylinum og lata seg úr svimjibuksunum, tá ið vit fara undir brúsuna har? Er tað synd at eta súlu? Og soleðis kundu vit hildið áfram

Eg haldi ikki, tað er vert, at Løgtingsformaðurin fer at lesa upp allar Mósebøkurnar og brøvini, sum Paulus ápostul sendi til ymisku bygdaløgini í Lítlaasiu, Róm o.s.fr. fyri at leggja upp til orðaskifti á Tingi um, hvørjar løgtingslógir skulu smíðast fyri at Føroyar skal kunna kallast eitt kristiligt land.

Tað verður ov drúgfort her at koma inn á hvørjar umstøðurnar og orsøkirnar vóru til, at Paulus skrivaði, tað hann gjørdi.

Málsetningur Føroya Løgtings

Løgtingslimir eru valdir inn á Ting fyri at smíða og samtykkja løgtingslógir, tí við lóg skal land byggjast. Endamálið við lógarsmíði er at skapa karmar um eitt gott samfelag, har menniskju kunnu trívast og liva uttan at skaða hvørt annað.

Eg taki undir við niðurstøðuni hjá Hera Joensen, har hann í blaðnum fríggjadagin 4. oktober skrivar, at »Føroyskir lóggevarar og landstýrismenn hava SKYLDU til at verja rættindi hjá minnilutum …« og at »Føroyskir lóggevarar hava RÆTT til at lóggeva eftir síni sannføring…«

Lóg um skrásett parlag

Ein lóg um skrásett parlag skal viðgera rættin hjá samkyndum pørum til ogn, arv o.s.fr.sum líkist tí, sum er siðvenja fyri tey pør, sum ganga undir heitinum hjún (ella hinkynd pør). Lógin skal neyvan seta reglur fyri, um teir báðir menninir, sum ganga saman í parlag, skulu hava hvør sítt kamar í teirra býli, heldur ikki um teir kunnu liggja í dupultsong ella um teir hava loyvi til at nema við hvønn annan ella ikki.

Nei, lógin eigur bara, so einfalt sum gjørligt, tryggja rættindi so sum arva og ognarrætt hjá tveimum, sum búgva og liva saman og ikki blanda sovorðið sum ættleiðing uppí, heldur ikki nakað um vígslu í kirkju.

Hvønn skaðar tað at tveir menn sleppa at ganga saman í skrásett paralag?

Eg dugi ikki at síggja, at tað kann skaða nakran føroying, at ein lóg um skrásett paralag verður samtykt av Føroya Løgtingi. Hinvegin kann tað skapa gleði og sálarfrið hjá okkum samkyndu, at tingmenn og -kvinnur vísa eitt vet av virðing fyri okkum sum minniluta. Vit viðganga, at vit ikki eru sum fólk flest og vita, at tað at vera samkyndur er viðføtt. Tað er í holdið borið. Vit halda okkum eisini hava rætt at fáa rímiligar umstøður í rættarsamfelagnum Føroyar.

Minnilutar

Á okkara døgum verður eitt demokratiskt rættarsamfelag mett eftir, hvussu kor, umstøður og rættindi hjá minnilutum eru; og hvussu minnilutar verða virdir og viðfarnir.

Tómrúm og loftrúm

Hergeir Nielsen

Uttanlandsnevndin fekk um dagarnar umsókn um at framleingja loyvið til amerikonsk stríðsflogfør at flúgva í føroyskum loftrúmi og at lenda í føroyskum øki.

Talan er um flúgving í NATO samanhangi, um at aktivera art. 5 í Washington-traktatini í stríðnum móti altjóða yvirgangi, og um flúgving við vandamiklum góðsi.

Løgmaður gav loyvið til hesa flúging fyri einum ári síðan, og nú árið er farið, fáa vit aftur umsókn um at framleingja hetta loyvið.

Løgmaður sigur í stuttum, at hann ætlar sær at geva loyvið, og vil smb. § 54 í stýrsskipanarlógini ráðføra seg við uttanlandsnevndina, áðrenn endalig avgerð verður tikin.

Eftir avtaluni skulu viðkomandi myndugleikar kunnast í hvørjum einstøkum føri, áðrenn føroyska loftrúmið verður nýtt til hesi endamál, men løgmaður sigur einki um í hvussu stóran mun føroyskt loftrúm er nýtt, ella um tað í heila tikið er nýtt farna árið.

Helst veit løgmaður einki um, hvat fyrifarist er, og neyvan fær hann nakað at vita framyvir heldur.

Nærlesa vit málið, síggja vit, at løgmaður fer at geva loyvi, men sjálvandi spyr hann uttanlandsnevndina fyrst, tí tað sigur stýrisskipanarlógin.

Síðani síggja vit, at danska uttanríkismálaráðið fer at geva loyvi til at flúgva í føroyskum loftrúmi, men biðjur ríkisumboðið spyrja føroyska Landstýrið fyrst.

Uttanlandsnevndin og løgmaður eru í somu trongu skóm. Og tað er danska uttanríkisráðið eisini. Í øllum uttanríkispolitisku fyrivarnum sínum ferðast Danmark við barnabillett, ma. í verjusamanhangi, og hevur tí lítið og einki at siga í størri avgerðum av hesum slagi.

Hóast talan sostatt bert er um reinar formalitetir, so hava vit frá danskari síðu fingið lyfti um kunning og ávirkan á føroysk viðurskifti á uttanríkis- og verjupolitiska økinum, og í samgonguskjalinum hava vit avtalað:

- "Samgongan hevur sum mál at vinna Føroyum veruliga uttanríkispolitiska ávirkan og at fyrireika egnan uttanríkispolitikk.
- Føroyskir myndugleikar skulu eftir greiðum reglum tryggja sær fult innlit í og avgerðarrætt á øll uttanríkis- og verjupolitisk mál, ið kunnu hugsast at hava týdning fyri Føroyar og føroyingar." Ikki spurdist nógv burturúr greiðum reglum, fullum innliti og avgerðarrætti í øllum hugsandi málum í hesum umfari.

Hugsandi er, at spenta støðan millum Irak og USA liggur aftanfyri. Her er stór ósemja í ST og millum NATO-londini, men óhugsandi var, at føroyingar sluppa at taka støðu til nakað sum helst.

Tá eitt mál er so illa lýst sum frammanfyri nevnda, við virðing fyri løgtingsinssamtyktunum um uttanveltaðu støðu Føroya og fyri ætlanum samgongunnar, var mín tilráðing til løgmann tí:

- "Soleiðis sum málið er lýst, fáa vit føroyingar einki innlit í tey átøk, ið ætlast at fara fram í føroyskum loftrúmi.
- Upplýst verður, at talan verður um flúgving við vandamiklum góðsi, og í hesum sambandi er eingin tilbúgvingarskipan tøk, um nakar vandi skuldi tikið seg upp.
- Vísandi til løgtingssamtyktirnar um uttanveltaðu støðu Føroya og til almennu ætlan Føroya um at tryggja sær fult innlit í og avgerðarrætt á øll uttanríkis- og verjupolitisk mál, ið kunnu hugsast at hava týdning fyri Føroyar og føroyingar heldur minnilutin, at málið ikki er búgvið at taka støðu til.
- Minnilutin mælir løgmanni til sum skjótast at tryggja okkum fult innlit í og avgerðarrætt á øll uttanríkis- og verjupolitisk mál eftir greiðum reglum og harafturat at taka almennu støðu Føroya sum partur av vesturheiminum og sum partur av NATO upp til viðgerðar beinanvegin."

Hetta málið er bara eitt av mongum, sum vísir, hvussu heimleysir vit føroyingar eru bæði burturi og heima.

Her síggja vit tað í uttanríkis- og verjupolitiskum samanhangi, hvar allur heimurin stendur á gáttini til eitt ragnarok, og nýliga sóu vit tað í ST samanhangi, tá Danmark millum øll heimsins lond fyri stuttum valdi at umboða ES og frávaldi Føroyar og Grønland.

Hvussu gjølla samlaða landsstýrið hevur viðgjørt politiska tómrúmi í føroyska loftrúminum, vita vit ikki, og tað fingu vit heldur einki at vita um, tí tað var nú hagar uttanríkismálaráðið sendi fyrispurning sín.

Tað vildi verið rættiliga viðkomandi, um vit - nú høvi beyðst - leitaðu upp andsvar til tey lyfti, ið nýliga eru givin um uttanríkispoltiska avgerðarmyndugleika okkara, har hesin viðvíkur reint føroyskum viðurskiftum.

Í hesum førinum varð føroyskur avgerðarrættur undirskrivaður "med påholden pen," - og tað var nú ikki júst tann trongan, vit ætlaðu okkum at leita inn í frameftir.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at elskaði maður mín, pápi, abbi, sonur og versonur okkara

Lasse Holm, Kvívík
ættaður úr Keypmannahavn

andaðist í heiminum sunnudagin, 51 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Kvívíkar kirkju mikudagin kl. 14.00.

Fyri tey avvarðandi
Súsanna, Randi, Rannvá, Rógvi, Rasmus og lítli Heini.

Tey, ið vilja minnast Lassa við blómum, kunnu ístaðin lata eina peningagávu til Føroya Felag móti Krabbameini.